# ítróttur

Nr. 80 • mikudagur • 28. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vedda føroyskt




*Møguleiki er at vedda um føroyskan fyrstudeildarfótbólt á Nordicbet.com. Møguleiki er at vedda um allar dystirnir í hvørjum umfari*

**Ein altjóða veddingarfyritøka er farin í holt við at bjóða føroyskar fótbóltsdystir sum veddingarmøguleikar. Fyribils verður roynt viðí fýra umførum av bestu fótbóltsdeildini hjá monnum**

ÍTRÓTTAVEDDING
*Heri á Rógvi*

Føroyskir fótbóltsfjepparar, við brelli eftir at sleppa at gera dystirnar eitt sindur meira spennandi, hava nú fingið ein gyltan møguleika. Veddingarfyritøkan Nordicbet.com er farin í holt við at bjóða føroyskar dystir sum veddingarmøguleikar.

Hóast tað er stutt fráliðið, síðani Nordicbet byrjaði at bjóða kundum at vedda um føroyskan fótbólt, so er áhugin ikki heilt lítil at vedda um føroyskan fótbólt.

Hetta sigur 21 ára gamli Suni Juul Pedersen, sum av egnum áhuga vendi sær til Nordicbet og vakti teirra áhuga fyri føroyskum fótbólti.

- Eg havi sjálvur veddað hampuliga nógv um fótbólt ymsastaðni. Eg helt tað kundi verið spennandi við møguleikanum at vedda um føroyskan fótbólt, so eg setti meg í samband við Nordicbetteir, sigur Suni Juul Pedersen.

Hann stýrir tí partinum av Nordicbet, ið snýr seg um føroyskan fótbólt. Hetta krevur, at Suni fylgir væl við, og hann heldur fyri, at tað er nógv meira spennandi at skipa fyri veddingini – heldur enn at vedda sjálvur.

Tað verður í fyrsta umfari bert føroyskur fótbóltur, sum verður á føroysku skránni hjá Nordicbet. Og tað eru dystirnir í bestu mansdeildini, ið kunnu geva nakað av avkasti ella tapi til føroysku veddararnar.

Àðrenn landskappingin byrjaði kundu fólkt tippa, hvør fór at vinna bestu mansdeildina. Har varð mett, at B36 hevði eigur bestan møguleikan at ogna sær gullkrónurnar, og havnaliðið hevði gav tí minst ferðir pengarnar aftur. Eisini vóru onnur spøl, eitt nú um Heine Fernandez, HB, fór at skjóta fleiri mál enn Jonhard Frederiskberg, Skála.

Suni Juul Pedersen sigur, at Nordicbet í fyrstu atløgu fer at royna føroyskan fótbólt í fýra vikur, og síðani verður gjørt av, um tað skal haldast fram við føroyskum fótbólti á Nordicbet.com..

## Alt møguligt

Tað er ikki serliga torført at fara í holt við veddingina á Nordicbet. Tú skalt stovna tær eina konto við peningi, sum tú síðani kanst vedda fyri. Lættast er at gjalda peningin inn við gjaldskorti, og so kanst tú vedda, sum tær lystir. Tað ber eisini til at flyta pengarnar umvegis peningastovn.

Tað er einki mark fyri, hvussu lítið tú kanst vedda fyri ella hvussu fáar dystir, ið tú kanst vedda. Tú kanst blanda føroyskar dystir við bæði aðrar fótbóltsdystir og dystir í øðrum ítróttagreinum. Harumframt eru ymisk serspøl, eitt nú hvør fer at gerast amerikanskur forseti.

Føroysku dystirnir verða lagdiar út á Nordicbet mikudagar, og kunnu veddast til stutt undan dystarbyrjan kunnu veddast

## Í Costa Rica

Tað er kortini ikki bara ein og hvør, sum kann bjóða seg fram at hava ítróttavedding í Danmark – og í Føroyum fyri sovítt. Ì Danmark eigur Dansk Tipstjeneste einkarrætt at bjóða veddingartænastur. Men ávirkar kortini ikki tað stóra á Internetinum. Allar tær veddingarfyritøkur, sum bjóða spøl til danir, eru skrásettar í øðrum londum. Hetta sama er galdandi fyri Nordicbet. Fyritøkan er skrásett í Costa Rica. Fyritøkan hevur umboðan í Norðurlondum, og í sínum virksemi leggur fyritøkan serliga dent á evropeiskan ítrótt av ymsum slag. Nordicbet ger á heimasíðu sínari nógv burturúr, at talan er um eina rættiliga og seriøsa veddingarfyritøkuna, sum nú hevur virkað við góðum úrsliti í eina tíð.

## Hjalgrím gjørdi trý mál

Hjalgrím Elttør gjørdi í gjárkvøldið trý mál fyri U21 liðið hjá Fremad Amager. Teir spældu ímóti FC Hillerød og vunnu 8-2.

Hjalgrím skoraði til bæði 1-0 og 2-0 tíðliga í dystinum, og hann gjørdi tað eisini til 3-1 stut fyri hálvleikssteðgin. U21 liðið hjá Fremad Amager er á odda í sínum bólki.

Hjalgrím Elttør hevur ikki verið við á besta liðnum hjá Fremad Amager seinastu tríggjar ferðirnar, men hann hevur skorað mál fyri U21 liðið og 2. liðið hjá felagnum hesa tíðina.

## Keane má bíða

Liðskiparin hjá Manchester United, Roy Keane, fær ikki sum væntað comeback á írska landsliðnum hesa vikuna.

Keane var úttikin til venjingardystin ímóti Póllandi í annaðkvøld, men hann er farin úr landsliðsleguni við einum skaða.

## Bymer liggur stillur

Danski álopsspælarin, Jacob Bymer, sum sunnudagin tryggjaði KÍ trý stig í fyrsta landskappingardystinum í ár, fær ikki spælt komandi vikuna.

Hann fekk ein skaða í lærið, og tí skal hann binda frið í minsta lagi í eina viku.

Møguliga verður hann klárur til fjórðingsfinalurnar í steypakappingini um slakar tvær vikur.

## Jákup og teir vunnu

Jákup á Borg og liðfelagarnir á eykaliðnum hjá OB spældu í mánadagin ímóti AaB, og teir vunnu dystin 2-1.

Bæði OB og AaB høvdu mannað sterk lið til dystin, og tí var talan um ein góðan og tættan dyst.



# Fótbóltsspælið skal vera í hásæti

**ÍF venjarin sigur seg hava gott mót, men hann vísir samstundis á, at tað hjá hansara monnum er neyðugt at lúka persónligu mistøkini, tí tey verða nógv meiri eirindarleyst sektað í bestu deildini, enn tey vórðu í 2. deild**

AFTANÁ 1. UMFAR
*Jóannes Hansen*

Fer tað at eydnast fuglfirðingum at býta seg fastar í bestu deildini, ella fara teir ella eitt annað av feløgunum í Eysturoy at flyta niður. Sjálvandi er grundarlagið fyri orðaskifti um henda spurningin ógvuliga ivasamt, nú bara eitt umfar er avgreitt í hesum kappingarárinum. Men tað eru kortini betri fyritreytir at tosa um kappingina nú, enn tað vóru, tá ið Sosialurin undan páskum gav serblaðið um fótbólt út.

At ÍF ella eitt annað lið í Eysturoy verður nevnt kemst av, at hetta økið eigur seks av tíggju liðum í bestu deildini. Eingin ímyndar sær, at HB og B36 fara at flyta niður. VB tykist vera væl fyri, og KÍ er betri fyri í ár, enn teir vóru í fjør.

Sigfríður Clementsen var venjari, tá ið ÍF í fjør flutti upp, og hann stendur framvegis við stýrisvølin í Fuglafirði.

– Sum heild var eg nøgdur við avrikið hjá ÍF í Gøtu, sjálvt um vit taptu 3–2. Tá ið vit fóru undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið, settu vit okkum fyri, at vit skuldu vinna dystir og stig í bestu deildini við at spæla fótbólt. Vit halda ikki, at nakað sum helst endamál er í at verja og sparka burtur eitt heilt kappingarár í vónini um, at tað kanska fer at bera nóg nógv stig við sær til at fáa møguleikan at verja og sparka burtur eitt ár afturat, sigur ÍF venjarin.

Tað var týðuligt í Gøtu, at ÍF liðið legði seg eftir at spæla. Teir pakkaðu seg ikki saman aftarlaga á vøllinum, og síðstu tveir triðingarnar av fyrra umfarinum vóru teir leikliga omaná.

– Í útgangsstøðuni høvdu vit Hanus Eliasen á framrættaðum miðvallarplássi ella sum hangandi álopsspælara. Tá ið teir vóru komnir framum, fluttu vit Hanus heilt fram. Tá spældu vit 4–3–3, meðan GÍ spældi 4–5–1. Tað átti at givið teimum yvirvág á miðvøllinum, men vit megnaðu at leggja trýst á verjuna hjá teimum, meðan teir stórar partar av 1. hálvleiki ikki vóru serliga vandamiklir frammanfyri málinum hjá okkum.

*Men kortini taptu tit?*

– Tað vísir, hvussu stóran týdning tað hevur at vera væl skipaður og ikki at gera persónlig mistøk. Gøtumenn eru sera væl skipaðir á vøllinum, og teir gera ikki nógv mistøk. Tá ið teir skoraðu fyrsta málið, kom tað eftir at bólturin úr høgru varð sendur tvørturum og afturum fýra verjuspælarar hjá okkum. Tað eigur ikki at koma fyri. Í 2. deild høvdu vit kanska ikki verið sektaðir fyri sovorðið mistak, men tað verður man í 1. deild. Tá ið teir skora næsta málið, er tað tí, at vit missa í uppspælinum. Tað er eitt tað ringasta, sum kann henda. Verjan er ikki skipað, og ímóti GÍ verður sovorðið sektað. Men vit arbeiða vit at betra um organiseringina og at lúka persónligu mistøkini. Í steypakappingini og venjingardystunum hava vit fleiri ferðir tapt við einum máli. Tá eru persónligu mistøkini serliga dýr.



*ÍF skal spæla og ikki sparka seg til stigini, sum eru neyðug fyri at varðveita plássið í bestu deildini, sigur Sigfríður Clementsen*

## Mugu vinna fleiri ferðir

Undanfarnu árini hevur tað víst seg, at eitt lið nógvu tey fyrstu umførini ikki hevur megnað at fingið stig og vunnið. Í fjør vann Skála ikki fyrrenn í 9. umfarinum, og í fyrraárið var sama skilið hjá teimum.

– Skálamenn royndu at spæla fótbólt í fjør, og tað fingu teir í síðsta enda nyttu burturúr. Í ár haldi eg teir hava gott fólk á mest sum øllum plássunum. Um teir í fjør bara høvdu sparkað og vart, so hevði støðan ikki verið tann hjá teimum nú, sum hon er, er metingin hjá ÍF venjaranum.

Í fjør flutti FS Vágar niður við 11 stigum. Í fyrraárið var TB aftast við 6 stigum. Í 2001 flutti FSV niður við 9 stigum, og í 2000 flutti Sumba niður við 10 stigum. Hægsta stigatalið, sum eitt lið er flutt niður við nógvu tey seinastu árini, er trettan. Tað flutti TB niður við í 1996.

– Tað kann væl vera, at tað í ár verður neyðugt at fáa uppaftur fleiri stig enn so fyri at vera vísur í at sleppa undan niðurflytingini. Kappingin tykist fara at verða jøvn, og kanska verður tað neyðugt at vinna fimm ella seks dystir fyri at verða heilt vísur í at varðveita plássið. Í fyrsta umfarinum vóru tað umframt okkum B68, EB/Streymur og HB, sum taptu. Eg rokni ikki við, at HB fer at halda fram við at tapa. B68 tykist vera betri fyri nú, enn teir vóru í steypakappingini, so tað sær rættuliga spennandi út.

Sunnudagin fer ÍF at spæla fyrsta heimadystin í landskappingini síðani 1999. Tá fáa teir vitjan av NSÍ sum í fyrsta umfarinum spældi 1–1 á heimavølli ímóti VB.

*Hava tit møguleikar at styrkja um liðið?*

– Vit hava hampuliga gott fólk. Bárður á Lakjuni er ikki í fullgóðari venjing enn. Tað er saknur í Árna Petersen, sum í fjør spældi í borðinum, og í miðvallaranum Høgna Zachariassen. Teir eru báðir skaddir. Helmingurin av liðnum hjá okkum hevur lítlar og ongar royndir av at spæla í 1. deild. Tær royndirnar fáa teir bara við at spæla. Tað er eisini á tann hátt, at teir skulu venja seg við, at ferðin er væl hægri, enn hon var í 2. deild. So vit mugu arbeiða nógv og miðvíst fyri at styrkja um fyritreytirnar, og eg havi gott mót, sigur optimistiski ÍF venjarin, Sigfríður Clementsen.




# Kvinnurnar í Italia

Í gjár kom føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti til Italia. Liðið hevur seinastu dagarnar vant og spælt í Danmark, men í gjáramorgunin var flogið úr Keypmannahavn til Milano.

Kvinnurnar skulu verða við í eini altjóða hondbóltskapping, sum verður hildin har norðuri í Italia, og tær spæla fyrsta dystin í dag klokkan 15.00.

Føroyar eru í bólki saman við Ísrael, Belgia og Letlandi, og fyrsti dysturin er ímóti Belgia.